## Størv

# Fólk til farmaavgreiðslur

Strandfaraskip Landsins lýsa við hesum eftir lastbilførara og avgreiðslufólki til farmastøðina í Tórshavn og Eysturoy.

**Uppgávurnar hjá farmastøðini**
Høvuðsuppgávan hjá farmastøðini, sum er undir farmaflutningsdeildini, er at samskipa, viðlíkahalda og menna farmaflutningin millum meginøkið og útjaðarøkini í Føroyum.

Aðrar høvuðsuppgávur eru:
- Planlegging
- Rakstur
- Koyrisamskipan
- Umsiting

**Størvini fevna um**
Høvuðsuppgávurnar hjá lastbilførarunum-/av-greiðslufólkunum eru at vera við til at:
- Fylgja uppgávum, málsetningum o.ø. fyri farmastøðina
- Tryggja gott samstarv við kundar, myndugleikar og aðrar samstarvsfelagar
- Vegleiða og upplýsa kundar
- Frágreiðingarskyldu yvirfyri leiðaranum

**Førleikakrøv**
- Koyrikort til lastbil/trailara
- Krana- og trukkprógv
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap
- Kundavinarligur

**Setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag..

**Umsóknir**
Umsókn við avriti av prógvum, ummælum, CV og tilvísingum skulu sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 22. oktober 2001, kl. 12.00

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú venda tær til Heina á Borg, farmaflutningsleiðara, á tlf. 343060 ella e-post: hab@ssl.fo

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

STRANDFARASKIP LANDSINS

**Landssjúkrahúsið**
FO 100 Tórshavn

# Almanna og heilsuatstøðingar/ sjúkrahjálparar

Tvey størv eru leys til setan sum skjótast

- fast starv 30 tímar um vikuna
- tíðaravmarkað starv 30 tímar um vikuna til 31. august 2002

**Uppgáva:**
Uppgávan verður í høvuðsheitum at røkta ein respiratorsjúkling á Landssjúkrahúsinum við serligum tørvi fyri fastari vaktarskipan døgnið runt. Tíðarskeiðið er tengt at tørvinum hjá hesum sjúklinginum.

**Førleikakrøv:**
- útbúgving sum almanna og heilsuatstøðingur ella sjúkrahjálpari
- royndir innan sjúkrarøkt í 1-2 ár
- evni til at skapa eitt trygt og heimligt umhvørvi
- evni til at arbeiða sjálvstøðugt
- evni til gott samskifti og samstarv

**Upplæring:**
Upplæring í hesum serligu uppgávum verður givin á Landssjúkrahúsinum

**Lønar - setanarviðurskifti:**
Størvini verða sett sambært sáttmála við viðkomandi yrkisfelag.
Setanarøkið verður Landssjúkrahúsið við tænastu á tí deild sum sjúklingurin til eina- og hvørja tíð er á.

**Nærri fæst at vita um størvini** við at seta seg í samband við deildarsjúkrasystrina Helena Dal-Olesen á tlf 31 35 40 lokal 106 ella til Ásu Poulsen, yvirsjúkrasystir á lokal 300 e-post asap@ahs.fo

Umsóknarfreist: 29. oktober 2001 kl. 12.00

Umsókn saman við avriti av prógvi v.m. skal sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn


# KLAVER-TILBOÐ!

**ROLAND KLAVER HP 137R**
**88 vektaðar tangentar • 4 ymisk ljóð**
**• Stereo sampla ði klaver ljóð**
**• 64 tóna polyfoni**



SPAR 1330,-
11990,00
Vanligur prísur: 13320,00
AVGJØRT FØROYA LÆGSTI PRÍSUR! ALTÍÐ BILLIGAST Í ELDING!

ELDING
SMS - Tel 319697 • Saltangará - Tel 449697 • Klaksvík - Tel 479697


# Hús til sølu





Um nóg høgt boð fæst, verða húsini Millum Gilja 58, Hoyvík, seld.

Grundøkið er 500 m². Húsini eru bygd í 1988, og eru í 2 hæddum, uml. 120 m² hvør hæddin. Í stovuhæddini er durur, gongd, grovkøkur, køkur og stova í einum (niðursenkað stova), hjúnarúm, 2 kømur, 2 baðirúm. 1/3 av kjallaranum er innrættaður til kamar og trappuuppgongd. Restin er óinnrættað. Møguleiki er at innrætta loftið, hæddin er 219 cm á miðjuni.

Áhugað kunnu ringja á **tlf. 219555 - 320555**

# Grundstykki í Klaksvík

(á Vágsheygnum) til sølu, um hóskandi boð fæst.

**Tlf. 225233**

# Jóla sølustevna

**verður á Giljanesi 24.-25. november.**

Teir handlar, fyritøkur og onnur, sum ætla at vera við, verða biðin um at siga frá skjótast gjørligt á telefon 333050 ella 211072.

**Miðvágs Róðrarfelag**

***Leikhúsið Gríma***

sýnir leikin

# *Fótur í hosu*

eftir Súsonnu & Hans Tórgarð
leikstjórn Hans Tórgarð
á Meiarínum

| | |
|---|---|
| **týskvøldið** | **16.10.2001 kl. 20.00** |
| **mikukvøldið** | **17.10.2001 kl. 20.00** |
| **hóskvøldið** | **18.10.2001 kl. 20.00** |

Atgongumerki á kr. 100,- fáast á Kunningarstovuni og við dyrnar 1 tíma undan sýning. Bólkar uppá 10 ella fleir fáa 20% avsláttur.

# *Fulltrúar til kolvetnisskattadeild*

**Toll- og Skattstova Føroya**

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskattalógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at planlegging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík, røkja raksturin.

Núverandi setanarøki er Klaksvík, men fevnir annars um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir hennara, og tann, ið settur verður, skal kunna røkja tænastu á hesum støðum, um tað verður kravt.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrinum, í hendi í seinasta lagi

**30. oktober 2001.**

*Toll- og Skattstova Føroya*
*Stýrið*
*Postsmoga 2151*
*FO-165 Argir*

Søkt verður eftir tveimum løgfrøðingum og tveimum roknskaparfrøðingum til nýggju kolvetnisskattadeildina í Klaksvík at byrja so skjótt til ber. Fyrisitingin er nýggj í føroyskum skattahøpi, tí fáa umsøkjararnir at byrja við eina rættuliga sjálvstøðuga uppgávu saman við deildarleiðaranum at byggja upp eina kolvetnisskattafyrisiting.

**Høvuðsuppgávurnar verða eitt nú:**
- – at taka avgerðir í principiellum spurningum, har síðvenja enn ikki er løgd, herundir gera tilmælir í slíkum spurningum til Toll- og skattaráðið,
- – fyrireika neyðug skjøl og leggja til rættis kunngerðir, rundskriv og vegleiðingar sambært kolvetnisskattalógini og kolvetnisskattafyrisitingarlógini,
- – at leggja innanhýsis mannagongdir til rættis,
- – at skipa fyri bæði innan- og uttanhýsis kunning,
- – at álíkna/grannskoða roknskapir frá loyvishavarum,
- – at taka sær av álíkning, roknskapareftirliti/grannskoðan, skráseting og viðgerð av upplýsingum um útlendsk vinnurekandi og útlendskar løntakarar, sum eru umfataðir av kolvetnisskattalógini,
- – at gera krøv galdandi um ábyrgd fyri skatti, avgjøldum v.m.,
- – at viðgera kærur,
- – at vera við at skipa fyri útbúgving av starvsfólkum,
- – at hava samband við útlendskar kolvetnisskattamyndugleikar o.a.m.
- – og at virka sum ráðgevi hjá politiska myndugleikanum í løgfrøðiligum og roknskaparligum spurningum innan kolvetnisskattingina.

Uppgávurnar verða at byrja við loystar í felag av bæði løgfrøðingum og roknskaparfrøðingum. Um kolvetnisframleiðsla fer í gongd, verða uppgávurnar meira náttúrliga býttar upp í ein løgfrøðiligan og ein roknskaparligan part, samstundis sum ein partur av álíkningaruppgávunum verður lagdur á Tvøroyri.

**Førleiki**
Umsøkjarar til løgfrøðiligu størvini skulu hava útbúgving sum cand. jur. ella líknandi útbúgving. Roknskaparfrøðingarnir skulu hava roknskaparliga útbúgving á slíkum stigi, sum ger teir førar fyri at viðgera torgreiddar roknskaparligar spurningar.
Fólk, sum eru í ferð við at gera seg liðnan við lesnað eru eisini vælkomin at søkja.

**Vit bjóða**
- eitt spennandi starv við avbjóðingum, fakliga eins væl og persónliga,
- at vera við til at leggja títt egna arbeiðspláss til rættis frá byrjanini av
- flextíð
- sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi

**Setanartreytir**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi fakfelag.

**Spurningar hesum viðvíkjandi** kunnu setast Stýrinum, Marjun Reinert Simonsen ella Óla Heinesen tlf. 352600.

# *Størv í kolvetnisumsiting o.ø.*

**Toll- og Skattstova Føroya**

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálastýrinum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll-, mvg-, kolvetnisskatta- og avgjaldslógirnar, inntøkuskatta-lógina v.m. og alla skuldarinnkrevjing hjá landinum.

Stovnurin hevur 150 starvsfólk og er skipaður soleiðis, at plan-legging og menning fer fram í Stýrinum á Argjum. Tær seks økisskrivstovurnar, ið eru á Tvøroyri, í Skopun, Sørvági, Tórshavn, Saltangará og Klaksvík røkja raksturin.

Núverandi setanarøki er Suðuroyar Øki, men fevnir annars um aðalstýrini, løgmansskrivstovuna og deildir teirra, og tey, ið sett verða, skal kunna røkja tæn-astu á hesum støðum, um tað verður kravt.

**Umsóknir:**
Umsóknir við avriti av prógvi og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir skulu vera Toll- og Skattstovu Føroya, Stýrinum, í hendi í seinasta lagi

**22. oktober 2001.**

*Toll- og Skattstova*
*Føroya*
*Suðuroyar Øki*
*Postsmoga 69*
*FO-800 Tvøroyri*

Á Toll- og Skattstovu Føroya, Suðuroyar Øki, eru tvey størv leys at søkja til setan sum skjótast til ber.

**Arbeiðsuppgávur**
Talan er um fjølbroytt arbeiði, og eru arbeiðsuppgávurnar m.a. skráseting av persónstølum í samband við oljuvinnuna, harumframt innkrevjing av gjaldi í samband við barsilsskipanina, umsiting av frítíðarløn og frítíðargrunni, arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum o.a.m. Annars skal viðkomandi altíð vera villigur til at taka sær av øllum teimum uppgávum, sum verða álagdar økisskrivstovuni.

Stórur partur av arbeiðinum er bóking og avstemman av inngjøldum. Tær ymsu skipaninar hava sín egna roknskap, sum verður grannskoðaður av uttanhýsis grannskoðara. Til arbeiðsuppgávuna krevst eisini at luttikið verður á fundum.

*Arbeiðsuppgávurnar, sum nú liggja í Stýrinum á Argjum, verða fluttar til Tvøroyrar. Stýrið syrgir tí fyri neyðugu upplæringini av nýggjum starvsfólkum í samband við at uppgávurnar verða fluttar*

Um so er, at nýggjar ella broyttar uppgávur í hesum sambandi verða álagdar økinum, skal viðkomandi vera villigur at taka sær av teimum.

**Førleikakrøv**
Tey, sum sett verða, skulu hava skrivstovuútbúgving e.l. og helst roknskaparligan kunnleika, vera arbeiðssom, fyrikomandi og duga væl at leggja arbeiðið til rættis. Stórur dentur verður lagdur á, at viðkomandi arbeiðir sjálvstøðugt, er vanur við telduarbeiði, og er førur fyri at mynda avgerðir í dagliga arbeiðinum.

Harafturat skal viðkomandi vera fúsur at luttaka á skeiðum og útbúgvingum, ið Toll- og Skattstova Føroya fyriskipar.

**Vit kunna bjóða**
- eitt spennandi og krevjandi starv við nógvum og fjølbroyttum uppgávum
- flextíð
- eitt sjálvstøðugt starv í góðum arbeiðsumhvørvi

**Løn og setanarviðurskifti**
Løn- og setanarviðurskiftir, sum eru treytað av starvsroyndum og útbúgving, eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

**Setanartreytir**
Starvið verður sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi fakfelag.

**Spurningar hesum viðvíkjandi** kunnu setast Mai-Britt Vinther, økisstjóra á Toll- og Skattstovu Føroya, Suðuroyar Øki, á tlf. 37 10 51.


Sosialurin
-tað loysir seg


# Frá Tórshavnar Bátafelag

Ársveitslan verður 10. nov. kl. 19.30 í neystinum hjá Argja Róðrarfelag.

Borðreitt verður við røstum kjøti og súpan. Kaffi og køkur omaná. Morgunmatur við við føroyskum viðskera.

Jentoft og vinmenn spæla til dansin.

Atgongumerki á kr. 230,- fáast til keyps í Kunningarstovuni til 1. nov.

**Tórshavnar Bátafelag**